

*EB/Streymur fekk góða byrjan á grasinum í Hvalba*
**Mynd: Áki Bertholdsen**

# Stigini fóru norðaneftir

*2. deild: Hóast tað var Royn, sum hevði bóltin meira, so fingu EB/ Streymur flestu málini, og so fóru stigini av oynni*

JÁKUP MØRK

Royn-EB/Streymur 1-2 (1-1)

Mangan hava hvalbingar verið at sæð frammalaga í næstbestu deildini, og onkuntíð hevur tað eisini verið um reppið, at teir hava vunnið sær sess í bestu deildini.

Tað eru tó nøkur ár síðani, at so var, og seinnu árini hevur liðið verið nakað niðarligari í deildini. Mett út frá fyrsta dystinum, sum varð leiktur sunnudagin, verður tað heldur ikki í ár, at hvalbingar skulu reisa seg aftur.

**Royn favorittar**
EB/Streymur var beinanvegin, sum samanleggingin var veruleiki, at finna í bestu deildini. Steðgurin tá gjørdist tó nakað stuttur, og síðani hevur liðið verið at funnið í næstbestu deildini.

Onkuntíð hevur eisini verið um reppið, at felagsliðið noyddist niður í aðru deild, og serliga hevur tað tá verið byrjanin av kappingarárinum, at teir hava havt tað tungt.

Tí var kanska væntandi, at Royn skuldi verða drúgvara liðið hesu ferð, men tá 90 minuttir vóru leiktir, vóru tað tó sundalagsmenn, sum lógu omaná.

**Spæl men ikki mál**
Ikki tí, tað vóru kanska hvalbingar, sum høvdu bóltin meira, men tá kom til málmøguleikar, gekk tað rímuliga javnt á.

Útiliðið legði seg á odda á hálva tímanum. Andrias fekk ein bólt inni í brotsteiginum, og hann langaði bóltin í netið.

Stutta løtu seinni javnaði heimaliðið, tá Gisli Sveinbjørnsson varð spældur leysur.

Støðan helt sær so nakað inn í seinna hálvleik. Tá fekk Eyðfinn Joensen ein bólt stungnan fram ímillum, og einsamallur við málverjanum setti hann bóltin í netið.

Hvalbingar royndu at trýsta eftir hetta, og tað eydnaðist teimum eisini at fáa mál. Málið, sum Gisli skeyt, varð tó kolldømt fyri rangstøðu, og so gekk tað sum tað gekk.

Serliga hjá útiliðnum var talan um nógv ungt fólk, so kanska boðar hetta frá eini framtíð, har felagsliðið aftur verður at síggja í fremstu røð. Áðrenn hetta mugu teir tó vinna sær nakrar royndir, og tað er ikki víst, at allar fara at ganga eins væl og tann í Hvalba.

**Royn-EB/Streymur 1-2**
(1-1)
0-1 Andrias Dahl
1-1 Gisli Sveinbjørnsson
1-2 Eyðfinn Joensen

Dómari: Eiler Rasmussen

# Dýrir deyðbóltar

*1. deild: Í fyrsta fyrstudeildardystinum, sum er leiktur í Sørvági, fingu áskoðararnir seks mál á matarlepanum, men sjálvt spælið var kortini ikki nakað at reypa um*




*Tríggjar ferðir høvdu runavíkingar bóltin í málinum, men taptu deyðbóltsstøðurnar viðførdu, at tað bert kom eitt stig burturúr. Vágamenn vóru tó heldir ikki nøgdir við úrtøkun, so javnleikur hevur helst verið á einari leið*

JÁKUP MØRK

FS Vágar-NSÍ 3-3 (1-1)

Talan var um eina søguliga løtu, tá bestu mansliðini hjá FS Vágum og NSÍ fóru á vøllin sunnudagin. Hetta var nevnliga fyrstu ferð, at fyrstudeildardystur í fótbólti skuldi leikast í Sørvági. SÍ hevur fyrr verið í bestu deildini, men tá æt deildin meistaradeildin.

Harumframt var veðrið eisini av tí allarfagrasta, og henda blandingin hevði gjørt sítt til at rættuliga fitt av fólki hevði leitað sær til Sørvágs at fylgja samansetta liðnum, sum nú aftur hevur vunnið seg upp í bestu deildina.

Onkur vildi kanska vera við, at tað boðaði ikki frá góðum, at runavíkingar vóru fyrstu gestirnir. NSÍ hevur nevnliga havt eitt løgið ár higartil, har teir hava tapt alt heima í steypakappingini. Á útivølli hevur hinvegin ligið betri fyri. Tríggir dystir í steypakappingin góvu níggju stig, og í landskappingini eydnaðist tað at basa klaksvíkingum í Klaksvík, so eftir hesum hagtølum at døma, var talan um ein sera torføran heimadyst.

**Ivasamt brotsspark**
Vágamenn vóru tó teir, sum løgdu bragdligari fyri, og dysturin var ikki gamal, tá Birgir Joensen fekk fyrsta møguleikan at leggja vertirnar framum, men púra leysur við málverjanum eydnaðist tað honum ikki at fáa mál.

Eftir hetta fingu bæði liðini tó nøkunlunda skil upp á verjuspælið, soleiðis at hvørki av liðunum hevði nakrar serligar málmøguleikar. Tað eydnaðist tó vágamonnum at leggja seg á odda, tá Darius fekk longt eitt innkast til John, sum við høvdinum beindi bóltin í málið.

Eftir hetta var kanska líkt til, at vágamenn høvdu tamarhald á tí mesta. Onkrar skotroyndir vóru frá báðum pørtum, men teir opnu møguleikararnar var als ikki talan um.

Leikarar og áskoðarar høvdu kanska sligið seg tols við, at 1-0 eisini skuldi vera hálvleiksstøðan, men tá tveir minuttir vóru eftir av hálvleikinum, bríkslaði dómarin brádliga fyri brotssparki. Vágamenn vóru í øðini um dómin, og sum skilst, so ásannaðu runavíkingarnir eisini, at talan í øllum førum var um eitt sera tunnan dóm. Sjúrður Jacobsen takkaði tó fyri møguleikan, og setti bóltin í netið, soleiðis at javnstøða aftur var á máltalvuni.

**Jónstein skeyt perlumál**
Seinni hálvleikur var einans fimm minuttir gamal, tá Jónstein Petersen skeyt vakrasta málið í dystinum. Hetta hendi eftir at Gert dróg fram við verjuleikara í høgru og sendi innfyri. Jónstein møtti bóltinum við fullari ferð, og langaði bóltin í netið uttan nakran møguleika hjá Remi at verja fyri.

Heimaliðið royndi so aftur at trýsta á NSÍ málið, men spælið var alt ov óskipað og óstøðugt til at nakrir stórir møguleikar spurdust burturúr. Tað eydnaðist teimum tó at javnað, og aftur hesa ferð var talan um deyðbóltsstøðu. Fríspark varð sent innfyri úr høgru, og við nærmasta stólpa eydnaðist Tór Ingar Akselsen at seta høvdið á bóltin.

Støðan helst sær so at siga allan dystin, men tá einans tveir minuttir vóru eftir at leika, legði NSÍ seg enn einaferð á odda. Talan var ikki um nakrar vandamikla støðu, tá Sonni Petersen fekk bóltin í høgra borðið. Verjuleikararnir fingu eisini bóltin av honum, men tað eydnaðist kortini Sonna at vinna hann aftur, og eftir at hava krúllað seg ímillum fýra verjuleikarar, trillaði hann bóltin útfrá so Eddie Mikkelsen kundi senda bóltin í netið.

Sum vera man tóktist vágamenninir nakað nipnir eftir hetta, men enn einaferð fingu teir togað seg á javnt, og enn einaferð eftir deyðbóltsstøðu. Hesu ferð varð tað Darius, sum við høvdinum stýrdi frísparksinnleggið í málið, og løtu seinni var dysturin lokin.

**Mugu venja deyðbóltar**
Sostatt eydnaðist vágamonnum at fáa sær fyrsta stigið á árinum til høldar. Hesum hava teir eftir øllum at døma eisini tørv á, tí komandi dystirnir eru alt annað enn lættir, tá teir skulu spæla móti havnarliðunum báðum, sum í løtuni eru nummar eitt og tvey á stigatalvuni.

Runavíkingar megnaðu enn einaferð at vinna sær stig á útivølli, men tað má vera tankavekjandi, at øll trý málini vórðu sett inn við høvdinum, og at øll trý komu eftir deyðbóltsstøður.

**FS Vágar-NSÍ 3-3 (1-1)**
1-0 John Johansen 25.
1-1 Sjúrður Jacobsen 43. (Br.)
1-2 Jónstein Petersen 50.
2-2 Tór Ingar Akselsen 67.
2-3 Eddie Mikkelsen 88.
3-3 Darius Magdisauskas

Dómari: Petur Reinert

**FS Vágar:**
Remigius Mikoliunis - Emil Hentze, Zilvanuis Zudis, Darius Magdisauskas, Jack Johansen - Sonni Johansen, Hannus Olsen, Albert Ari Thomassen, Tór Ingar Akselsen - John Johansen, Birgir Joensen

**NSÍ:**
Rúni Joensen - Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen - Dánjal Hansen, Ian Højgaard, Djóni N. Joensen - Gert Langgaard, Christian Høgni Jacobsen, Jónstein Petersen



# B36 skeyt fýrverk á Svangaskarði

*1. deild: Hóast toftamenn høvdu bóltin eins nógv sum mótstøðumenninir, so vóru teir púra vandaleysir í álopspartinum, meðan verjuparturin var óvanliga tunnur*

Fjórða árið á rað og fyri fjórðu ferð í alt fór B36 av Svangaskarði við øllum trimum stigunum. Og hóast gestirnir ikki høvdu bóltin stórt meiri enn vertirnir, so var sigurin sannførandi.

B68 megnaði ikki at seta B36 verjuna undir trýst. Teir báðir álopsmenninir vóru hildnir í stuttum tjóðri av Mikkjali Thomassen og Herberti í Lon Jacobsen. Hóast vongspælararnir hjá B36 vóru so framrættaðir menn sum Bjarni Prior og Magni á Lakjuni, so var tað í 1. hálvleiki so eiðasørt, at B68 megnaði at bróta ígjøgnum í borðunum. Tað royndist eitt sindur betur í 2. hálvleiki, tá Øssur Jacobsen (kom í 1. hálvleiki inn fyri skadda Eyðstein Skipanes) fleiri ferðir streyk til baklinjuna í vinstru og sendi krossbóltar í brotsteigin, men tað spurdist einki burturúr, m.a. tí Egil Zachariasen dugdi sum aftasti maður væl at lesa spælið.

Jan Guttesen arbeiddi sum ein hestur mitt á B36 miðvøllinum, og Ronnie Samuelsen tykist rættuliga at hava fingið høvdið fyri seg á framrættaða miðvallarplássinum.



*Her sleppur Marlon framat, men meginpartin av tíðini var tað Magni, sum var omaná*
**Mynd: J. Jacobsen**

**Jens Kristian og høgra beinið**
At tað var dyggur smeitur hjá B68, at treiski veteranurin, Jan Petersen, ikki var við, var sjón fyri søgn. Høgra verjuborð var sum ein opnahjallur. At miðvøllurin í høgra borði var ússaligur í verjupartinum gjørdi fyritreytirnar hjá B36 uppaftur betri, og hvítklæddu menninir tóku av.

Tá teir komu á odda eftir fýra minuttir, stóð Jens Kristian Hansen púra leysur við handara stólpa, eftir at ein B68 verjuspælari hevði snittað frísparksinnlegg úr høgru frá Bjarna Prior víðari.

Og tá liðformaðurin á landsliðnum eisini økti til 2–0, var tað eftir uppspæl í vinstru. Eitt sindur frammanfyri miðstrikuna fangaði B36 vánaligt útspark frá B68 málverjanum, spælt varð í vinstra borð, har Ronnie Samuelsen og Magni á Lakjuni vóru fadrar. Hesin seinni nevndi legði innfyri til John Petersen, sum ætlaði at snara um seg sjálvan og royna móti málinum. Hetta eydnaðist ikki, og so legði John út frá til Jens Kristian Hansen, sum úr 21 metrum og við høgra beini sendi flatt dygst úti við stólpan.

**Jákup á Borg brendi**
Fram til seinna málið, sum kom í 36. minutti, hevði B36 givið eitt sindur av vøllinum frá sær. Aftaru menninir hjá B68 fingu loyvi at spæla ímillum sín, men tað eydnaðist ongantíð at gerast vandamiklir frammi á vøllinum. Marcello Marcellino legði eina ferð innfyri til Súna Fríða Johannesen, sum við veikum stútara rakti tvørtræið, men Tróndur Vatnhamar varð ongantíð noyddur rættuliga at vísa, hvør dugur er í honum sum málverji í 1. deild.

At B36 fekk tvey mál í 1. hálvleiki var í minna lagið. Tað kann serliga Jákup á Borg, sum fyri tað mesta helt seg í høgru, skriva undir uppá. Tríggjar ferðir misnýtti hann stórar møguleikar. At hann í 16. og 32. minutti megnaði at fáa bóltin uppum var næstan ófatuligt.

**John enn eina ferð**
Síðani John Petersen í 1997 fór at spæla við B36, hevði hann í seks landskappingardystum móti B68 skorað níggju mál, ella í miðal 1,5 mál. Aftur sunnudagin var hann dýrur fyri toftamenn. Í útgangsstøðuni var John Petersen álopsmaður, men hann tók dúgliga lut í uppbyggjandi spælinum.

Níggju minuttir eftir steðgin slerdi John Petersen B36 sigurin rimmar fastan. Magni á Lakjuni, sum tað átti at verið pláss fyri longri frammi á vøllinum, legði innfyri úr vinstru, og John Petersen smekkaði bóltin í handara stólpan, áðrenn hann fór í kassan.

Ei undur í, at lagið var gott á sólsíðuni, har høvuðsstuðulin hjá B68, Føroya Tele, forvann sær nøkur oyru. Samrøðurnar um fartelefonirnar og suður í høvuðsstaðin vóru nógvar.

**Ikki sannførandi**
Á Toftum vilja teir fegnir standa seg betri, enn teir hava gjørt síðstu sjey árini. Í ár tykjast teir hava fólk og venjara til tað, men avrikið sunnudagin boðaði ikki frá góðum.

Øssur Hansen var við í nógvum á miðvøllinum, men hann hevði ikki nógvan stuðul – heldur ikki frá landsliðsfelaganum, Fróða Benjaminsen, sum annars hevur havt eitt gott kappingarár higartil í ár.

Brasiliumenninir stóðu saman við nógvum av hinum veikir í myndini. Jákup Eli Olsen stríddi seg tólv minuttir fyri leiklok til fyrstu veruligu skotroyndina. Úr 20 metrum sendi hann nett í sama stað, sum bólturin fór, tá B36 økti til 2–0.

Eftir at B68 hevði minkað um munin, fluttu teir fólkið longri fram á vøllin. Hetta bar nógvar møguleikar við sær í báðum endum. B36 menninir vóru ofta tríggir móti einum verjuspælara, men teir megnaðu ikki at fáa mál.

Jann Ingi Petersen er ein av ungu toftamonnunum. Hann kom á vøllin í 2. hálvleiki, og avrikini hjá liðfeløgunum sunnudagin kundu bent á, at ungi og evnaríki maðurin fer at fáa meiri spælitíð í komandi dystunum.

JH

**B68–B36 1–3 (0–2)**
0–1: Jens Kristian Hansen 5.
0–2: Jens Kristian Hansen 36.
0–3: John Petersen 54.
1–3: Jákup Eli Olsen 78.

**B68:**
Magnus E. Poulsen – Mannbjørn Nesá, Jan Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes – Marcello Marcellino, Súni Fríði Johannesen

**B36:**
Tróndur Vatnhamar – Mikkjal Thomassen, Egil Zachariasen, Herbert í Lon Jacobsen – Bjarni Prior, Jan Guttesen, Ronnie Samuelsen, Jens Kristian Hansen, Magni á Lakjuni – Jákup á Borg, John Petersen



*Nú hava fuglfirðingar aftur orsøk til at fegnast*

# Fuglfirðingar bastu grannunum

*2. deild: Fyrsta stigið hjá ÍF á leiðini móti fyrstudeild varð tikið, tá teir leygardagin vunnu grannauppgerðina móti LÍF*

ÍF–LÍF 2–1 (1–0)

Munurin í málum var ikki so stórur, og hóast leirvíkingar síðstu løtuna av øllum alvi royndu at koma afturíaftur, tá teir høvdu minkað um munin til 2–1, so var tað heimaliðið í Fuglafirði, sum hevði øll stigini, tá Tummas Pauli Olsen bríkslaði fyri síðstu ferð.

Hetta var ikki óvæntað, tí fuglfirðingar hava móttstatt LÍF havt fyrimunin av at spæla í bólkaspælinum í steypakappingini og harvið hava teir fingið nógvar góðar venjingardystir.

Leirvíkingar sakna fleiri av spælarunum, ið vóru á liðnum, sum í fjør telvaðist um eitt pláss í bestu deildini. Útgangsstøðan hjá Hans Mouritsi Foldbo boðaði frá, at leirvíkingar høvdu verið nøgdir við javnleik. Teir høvdu nógv fólk aftarlaga á vøllinum, og so royndu teir við longum bóltum til liðformannin, Kristian í Vági, og skjóta Petur Sjúrðarberg.

Hjá ÍF tóktust nervar at vera uppií fyrstu løtuna, men um miðjan 1. hálvleik fingu teir meiri tak á spælinum, og seks minuttir fyri hálvleik var væl upplagdi Rúni Petersen, sum var í álopinum saman við Bárði á Lakjuni, fyrtu ferð uppá spæl. Bólturin kom fyrst innfyri úr vinstru, so varð hann sendur í høgra borð, har Roy Róin, sum stóð sterkur í myndini, legði flatt innfyri. Rúni Petersen var fyrstur á við nærra stólpan.

LÍF legði eisini í 2. hálvleiki varðliga fyri. Tólv minuttir vóru farnir, tá Rúni Petersen økti. Innleggið kom úr høgru, og álopsmaðurin var staddur í málteiginum, tá hann fekk loyvi at temja bóltin og smekka hann framvið Trygva Olsen í málinum.

Eftir at ÍF, sum misnýtti tríggjar stórar møguleikar, hevði økt um leiðsluna, flutti LÍF fólkið longri fram á vøllin. Hetta órógvaði týðuliga ÍF, sum misti rútmuna. LÍF minkaði um munin í 66. minutti. Steingrím Skoralíð, sum var vongspælari í høgru, legði fríspark innfyri. Teir drálaðu í ÍF verjuni, og so var Kristian í Vági fyrstur á og stútaði í kassan.

LÍF trýsti síðstu løtuna, men leirvíkingar megnaðu ikki at javna.

JH

**ÍF–LÍF 2–1 (1–0)**
1–0: Rúni Petersen 39.
2–0: Rúni Petersen 57.
2–1: Kristian í Vági 66
.
Dómari: Tummas Pauli Olsen